# Fundur í Hvalbiar sóknar kommunu hin 13. juli 2015

Møttir vóru: Rúni Thomsen, Magni Bertholdsen, Eyðfinn Debes, Martin í Nesi, Niels J. Thomsen, Niels Olaf Eyvindsson og Sunrid Olsen. Trúgvi Gudmundarson og Jóhan Eli Poulsen vóru burturstaddir.
Formaðurin bað um loyvi at taka tvey mál við aftrat – hesi koma á skránna sum mál nr. 6 og 7.

Fundurin varð settur kl. 17.30.

1. **Umsókn um stuðul við keyp av litibók frá útgávufelagnum "Purluknokk".**
   Samtykt varð einmælt ikki at stuðla útgávuni.

2. **Umsókn um byggiloyvi til seyðahús á matr. nr. 515, Sandvík.**
   Samtykt varð at geva byggiloyvi til seyðahús á matr. nr. 515 í Sandvík sambært umsókn, givnum upplýsingum og viðlagdari tekning, treytað av, at frárensilið verður veitt í ein afturlatnan brunn. Somuleiðis verður sett sum treyt, at bygt verður 5 metrar frá vegnum.

3. **Til umrøðu – høli til fjarlestur.**
   Onkur lesandi hevur spurt um møguleikan at útvega høli til fjarlestur og í hesum sambandi er loftið á kommunuskrivstovuni ella Sandvíkar skúli nevnd. Meiriluti er fyri at bjóða høli á kommunuskrivstovuni fram og samtykt varð at finna eina loysn við lyklum v.m.

4. **Sandvíkar skúli - Føroya Listaskúli.**
   Føroya Listaskúli hevur víst áhuga fyri at leiga Sandvíkar skúla til ymisk skeið. Samtykt varð at biðja tey koma við einari skrá, nær tey ætla at brúka skúlan, tá annað virksemi eisini er har.

5. **Tekning av neystum í Nesi frá HMP Consult.**
   Vega- og havnanevndin hevur viðgjørt tekning av neystum í Nesi, har ætlanin í fyrsta umfari er at stoypa eitt neyst upp. Nevndin mælir til, at neystini verða 12 m. long ístaðin fyri 11,4 m. og at stoypiarbeiðið verður boðið út. Samtykt varð við fimm atkvøðum fyri at fylgja tilmælinum frá nevndini. Martin í Nesi tók ikki undir við hesum.

6. **Skriv frá borgara viðv. krambúðini á Hólum, Sandvík.**
   Søkt verður um loyvi at brúka krambúðina til sølubúð av heimavirkaðum lutum. Samtykt varð, at Trivnaðarnevndin kannar málið.

7. **Til ummælis – umsókn um marknaumskipan millum ymisk matr.nr. og vegin al.**
   Søkt verður um marknaumskipan í sambandi við breiðkan av Bíarvegi. Samtykt varð einmælt at viðmæla umsóknunum.

**8. Kunning um málsviðgerð síðani síðsta fund.**

**Vega- og havnanevnd (framløga Eyðfinn Debes):**

- Hamranes:
  Eyðfinn kunnaði um, at nevndin hevur umrøtt møguleikan fyri at dýpa havnina innanfyri vestara arm og at farið verður í holt við at kanna prísir hesum viðvíkjandi.

Rúni Thomsen kunnaði um skriv, ið ætlanin er at senda til landsstýrismannin í lendismálum og Føroya Løgting viðv. tunlinum. Bygdarráðið tók undir við at skrivið verður sent.

Fundarbókin lisin og skrivað undir. Fundur lokin kl. 19.30

Rúni Thomsen Magni Bertholdsen Eyðfinn Debes Martin í Nesi

Niels Jacob Thomsen Niels Olaf Eyvindsson Sunrid Olsen